## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av eystri, seinnapartin veksur hann vindin til stívt andøvsgul av landsynningi. Yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 16 og19 stig.




**Veðrið mánadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar, men um kvøldið møguliga regn. Hitin millum 17 og 20 stig.

**Veðrið týsdagin og mikudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og týsdagin møguliga regn, men mikudagin yvirhøvur turt og sólglottar, tó mjørki í støðum. Hitin millum 16 og 20 stig.

# »Tað er einaferð um árið…

**...at ólavsøka er, tá liva allir føroyingar í aðrari verð«, syngur Elin Heinesen í besta ólavsøkuhýri.**



*Mynd: Rúna Sivertsen*

Og tað er nú eisini hugnaligt at fara ein túr eftir Aarvegnum í Havn á ólavsøku, tí tá hittir tú vinir og kenningar, tú kanska sjáldan sært. Beint eftir sangin á Tinghúsvøllinum ólavsøkumorgun, hittu vit hesi trý fittu børnini í føroyskum klæðum á Vaglinum. Drongurin til vinstru eitur Halgir og býr í Klaksvík. Í vogninum sita tvíburðarnir, Gunn og Tóki, sum búgva í Havn. Teirra føroyski búni er gingin í arv, og er tað omman og ommubeiggjar teirra, sum fyrst hava átt klæðini.

Um teir báðir - Magnus Magnussen, kommunulækni í Klaksvík og Zacharias Hammer, filmsframleiðari – tosa um magnyl ella veðragjólingar í fitilendi, sigur søgan einki um.

*rs*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 9 |
| Ammassalik | 8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 11 |
| Seyðisfjørður | 9 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 17 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 26 |
| Tromsø | 22 |
| Bergen | 19 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 28 |
| Keypmannah. | 24 |
| Helsinki | 25 |
| Moskva | 25 |
| Berlin | 28 |
| Warzawa | 25 |
| Kiev | 23 |
| Bukarest | 23 |
| Paris | 22 |
| Madrid | 28 |
| Róm | 27 |
| Malorca | 29 |
| Athen | – |
| Malta | 29 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | – |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 32 |
| Sydney | 17 |
| New York | 23 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 22 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 9 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 992 hPa. í útsynning úr Íslandi stendur mesrsum í stað og grynnist. Tropiska ódnin »ALEX« á 45N-50V fer móti Írlandi.




Lágtrýstið í útsynning úr Írlandi – ex »ALEX« – fer spakuliga móti Írlandi . Tað gevur møguliga vaksandi vind á okkara leiðum mánanáttina.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 05/08 kl. 06[00]–06/08 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 11,2°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° - Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,4 mm – mált frá 05/08 kl. 06[00]–06/08 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 11,3 mm

Radio-verkstaður
Umvæling av:
● Sjónvarpum
● Videotólum
● Hi-Fi
Vit umvæla:
PHILIPS
PANASONIC
SAMSUNG
og onnur merki
Fokus ELEKTRONIK
Reynstún 19 · Argir
Tlf. 311306 - Fax 311306

Sera bíligt at
LEIGA
SJÓNVARP
Úr 240,- og niðureftir
EINKI DEPOSITUM
Allar std. 20-26"
Vit hava eisini video
RADIO VERKSTAÐIÐ
V/ Guttorm Mortensen
Mannbrekka 1
Tlf. 319544

## VESTFALLSKYRRINDI

30. juli: Mánin næstur jørðini
7. aug.: Seinna kvarter
11. aug.: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2004

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. aug | 00.24 | 12.59 | 11.59 | — | - | 12.14 | 02.24 | 14.59 | 03.24 | 15.59 | 11.14 | 23.49 |
| 8. aug | 01.34 | 14.09 | 00.34 | 13.09 | 00.49 | 13.24 | 03.34 | 16.09 | 04.34 | 17.09 | — | 12.24 |
| 9. aug | 02.32 | 14.56 | 01.32 | 13.56 | 01.47 | 14.11 | 04.32 | 16.56 | 05.32 | 17.56 | 00.47 | 13.11 |
| 10. aug | 03.20 | 15.44 | 02.20 | 14.44 | 02.35 | 14.59 | 05.20 | 17.44 | 06.20 | 18.44 | 01.35 | 13.59 |

| Dagur | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. aug | 10.14 | 22.49 | 00.39 | 13.14 | 01.39 | 14.14 | 00.09 | 12.44 | 01.24 | 13.59 |
| 8. aug | 11.24 | 23.47 | 01.49 | 14.24 | 02.49 | 15.24 | 01.19 | 13.54 | 02.34 | 15.09 |
| 9. aug | — | 12.11 | 02.47 | 15.11 | 03.47 | 16.11 | 02.17 | 14.41 | 03.32 | 15.56 |
| 10. aug | 00.35 | 12.59 | 03.35 | 15.59 | 04.35 | 16.59 | 03.05 | 15.29 | 04.20 | 16.44 |

5 707265 100067 >